# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25.01.2024 |
| Mál nr.: | 24/02065 |
| Málsviðgjørt: | AD, BAB, JS, EC |
| Ummælistíð: | Frá 29.01-12.02.2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

## Uppskot<br>til<br>Løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna

**(verklag um nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 til 2029)**

**§ 1.** Landsstýriskvinnuni verður heimilað at halda útreiðslur til at fremja heildarætlan at nútímansgera toll- og skattaskipanir landsins.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar til heildarætlanina kunnu í mesta lagi vera 150 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2031.

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsakir til uppskotið

*Ótíðarhóskandi skipanir*
Skipanirnar hjá TAKS eru í dag vorðnar ov gamlar og ótíðarhóskandi. Tær stuðla ikki undir dagførdar arbeiðsgongdir, krøv og ætlanir hjá TAKS. Skipanirnar eru bygdar á gamla tøkni frá 1980'unum og eru tí avbjóðandi at viðlíkahalda.

Samtíðarskattaskipanin kom 1. apríl 1984. Tað eru nú 40 ár síðani vit fingu núverandi tøkniliga grundvøll fyri okkara skattaskipan.   Skattaskipanin varð ment av Elektron og var tá grundað á somu tøkni, sum peningastovnarnir tá brúktu.

*Migrering yvir á Windows frá 2013 til 2018*
Í tíðarskeiðinum frá desember 2010 til 2012 arbeiddi TAKS saman við Elektron við at greina, hvussu ein nútímansgerð ella útskifting av fakskipanunum kundi gerast.

Í hesi tilgongdini gjørdist tað greitt, at tað í fyrsta umfari var alneyðugt at flyta fakskipanirnar frá tí gamla mainframe-platforminum til ein nýggjari Windows-platform. Tað vóru tvær orsøkir til hetta:

1. Peningastovnarnir, sum TAKS higartil hevði deilt mainframe-platformin við, høvdu avgjørt at flyta teirra skipanir til Danmarkar, sum merkti, at TAKS kom einsamalt at standa við kostnaðinum at reka platformin. Árligu útreiðslurnar til rakstur hjá TAKS fóru tí at økjast.
2. Platformurin var avoldaður, og Elektron kundi ikki veita vissu fyri, at mainframurin ikki fór at steðga upp. Um tað hendi, fór tað at fáa stórar avleiðingar fyri rakstrartrygdina fyri fakskipanirnar hjá TAKS.

Løgtingið samtykti í 2013 Løgtingslóg um tøkniliga umlegging av skattaskipanini.  Talan var um at migrera fakskipanirnar hjá TAKS frá mainframe (stórtelda) til Microsoft Windows grundaðar servarar.

Hendan migreringin var ein sokallað ein-til-ein migrering, sum merkir, at success kriteriið var, at ongin skuldi merkja nakran mun, at alt skuldi koyra, sum tað plagdi, men at allar skipanirnar vórðu fluttar frá mainframerakstur til servararakstur.

Verkætlanin var liðug í 2018 og hepnaðist sera væl, um enn nakað seinkað. Migreringin hevði ongar álvarsligar fylgir fyri hvørki borgarar, virkir ella samfelagið sum heild. Tað vísti seg stutt eftir migreringina, at hon varð gjøgnumførd í síðstu løtu, tí tá sløknaði tann eini mainframurin, og tað var ógjørligt at fáa lív í hann aftur. Eftir væleydnaðu migreringina hevur TAKS á hvørjum ári endurtikið, at tørvur er á at nútímansgera fakskipanirnar.

*Nútímansgerð byrjar*
Í 2019 fóru TAKS og Elektron at kanna, hvør nýggj tøkni skuldi brúkast til at nútímansgera skipanina, og við ársslok 2020 var komið til eina niðurstøðu. Fyri at tryggja, at hon var røtt, varð

óheftur ráðgevi biðin um at meta um hana. Hetta var fyrst í 2021, og í mars hetta árið varð so endaliga avgjørt, at arbeiðast skuldi fram ímóti:

- einum servicegrundaðum arkitekturi,
- einum API-grundaðum dátuútvekslingslagi,
- einum low code-menningaramboði til at menna brúkaramótið (OutSystems).

*Málsgongdin higartil*
Í yvirlitinum sæst málsgongdin higartil:

| | |
|---|---|
| 2010 | • Elektron boðar frá, at okkurt má gerast við Toll- og skattaskipana, tí hon fer ikki at kunna koyra leingi afturat. |
| 2011 | • Greining av tørvi og kostnaði. Niðurstøðan var, at migrering skuldi gerast fyrst. |
| 2013 | • Játtan til at migrera Toll- og skattaskipanina samtykt, og verkætlanin sett í gongd. |
| 2018 | • Migreringin liðug í november og hepnast væl. Stutt eftir steðgar gamli plattformurin upp. |
| 2019 | • TAKS fer undir arkitekturverkætlan í sambandi við nútímansgerð av Toll- og skattaskipanini, men lítil orka er á stovninum til slíka ætlan, so tað gongur seint. Korona rakar eisini. |
| 2020 | • TAKS metir, at bíðast kann ikki longur við nútíðargerðini og fer til verka, hóast fígging ikki er útvegað. |
| 2021 | • Í januar verður óheftur ráðgevi biðin um at koma við tilmælum um skipanararkitektur og val av menningaramboði til brúkaramót.<br>• Í juni byrjar uppseting av nýggjum menningar- og rakstrarplattformum (OutSystems, service-infrastrukturi, Docker og Kubernetes).<br>• Verkætlanarleiðari settur í starv og útboð gjørt til at manna eitt menningartoymi.<br>• Í september er kick-off til menning av fyrsta parti av skipanini. |
| 2022 | • Verkætlanin gongur eftir ætlan, men steðgar við ársenda, tí fígging vantar. Tó er neyðugt at gera tillagingar í mun til nýggju virkisskránna hjá Talgildu Føroyum. |
| 2023 | • Nærum øll KT-játtanin hjá TAKS verður brúkt til at fyrireika íbinding í nýggju virkisskránna hjá Talgildu Føroyum. Hetta verður gjørt í nýggju tøknini. |

*Útboð*
Í mun til nútímansgeringina av toll- og skattaskipanini og útboð, er tað avmarkað hvørjir partar av verkætlanini kunnu bjóðast út. Stórur partur av forrætningslogikkinum er sera kompliseraður, og tað krevur sera stórt innlit í verandi KT-skipanir sum stuðla undir virkseminum hjá TAKS at arbeiða við hesum. Hesa vitan eru tað bert nøkur fá lyklastarvsfólk á Elektron sum hava.

Hettaa merkir, at arbeiðið við at nútímansgera tann partin, sum verður kallaður ”backend”, ikki kann bjóðast út, men at tað er Elektron sum má gera hetta arbeiðið.  TAKS hevur sáttmála við Elektron um menning.

Hinvegin er tann parturin av verkætlanini sum snýr seg um at menna nýggja brúkaraflatu til starvsfólkini boðin út ímillum føroyskar veitarar. Í 2021 hevði TAKS eitt útboð eftir Outsystems-mennarum. Formula vann hetta útboð, og tí er tað Formula sum skal menna nýggju brúkaraflatuna til alla Toll- og skattaskipanina. Harafturat er neyðugt at knýta ymiskar serfrøðingar til verkætlanina, so sum agila projektleiðslu og serfrøðingar í Outsystems. Her hevur TAKS eina avtalu við donsku fyritøkuna NNIT.

Samanlagt er 52% av verkætlanini boðin alment út og 48% er menning frá Elektron, sum ikki er boðin út.

Arbeiðsbýtið ímillum hesar 3 fyritøkur er:

Elektron knýtur 6-8 KT-fólk at verkætlanini, Formula 5-6 KT-fólk og NNIT 2 ráðgevar. Harafturat verða 7-8 starvsfólk frá KT-menning á TAKS beinleiðis knýtt at verkætlanini. Soleiðis verða umleið 20-24 fólk av ymsum slag beinleiðis knýtt at heildarætlanini næstu 6 árini.

Ein partur av heildarætlanini, sum ikki er viðgjørdur enn, er um tann parturin, sum kallast bókhaldsskipanin, skal nútímansgerast á sama hátt sum restin av toll- og skattaskipanini ella ikki. Her kann tað vísa seg, at tað er skilabetri at velja eina standardskipan til áognarstýring. Um avgerðin verður at brúka eina standardskipan, so verður tann parturin eisini boðin út.

*Nútímansgjørda skipanin*
Myndin vísir arkitekturin í nútímansgjørdu skipanini. Tað sæst, hvussu hon er uppbygd sum ein lagkøka. Tað merkir, at hon hevur ein lagdeildan arkitektur.

Niðast eru dátugrunnarnir. Dátugrunnarnir verða fyri tað mesta óbroyttir í hesari verkætlan.

Næstniðast er maskinrúmið – forrætningslogikkurin, á fakmáli – har upplýsingar úr dátugrunninum verða viðgjørdar og uppsettar soleiðis, sum ásett er, at tær skulu verða uppsettar.

Upplýsingarnar sendar til næsta lag – dátuútvekslingslagið – haðani tær fara út á skermarnar hjá brúkarunum og so aftur sama veg. Soleiðis samskifta skipanin og brúkarin.

Niðastu løgini verða nútímansgjørd av Elektron. Tað krevur nágreiniligan kunnleika um skipanina at arbeiða við hesum løgum, og ta vitanina er tað bert Elektron, sum hevur.




Arbeiðið við at gera ovastu løgini, t.e. skermmyndir og annað, hevur verið í útboði. Formula fekk ta uppgávuna. Ment verður í OutSystems. Tað er skipan, sum Talgildu Føroyar eisini brúka, og sum gevur samstarvsfyrimunir.

Nærri útgreining av verkætlanini sæst í fylgiskjali 1 “Heildarætlan fyri Kjarnuna Nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 – 2029.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýriskvinnuni heimild at brúka 150 mió.kr. at nútímansgera skatta- og tollskipanirnar hjá Taks.

Talan er um 35 projektir í tí samlaðu heildarætlanini, og TAKS metir at hetta kemur at kosta 100 mió. kr. í 2022 krónum.

Av tí at heildarætlanin koyrir yvir 6 ár, er neyðugt at leggja upp fyri príshækkingum og óvissum, soleiðis at samlaði kostnaðurin er mettur at verða 150 mió. kr.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Gamla KT-skipanin hjá TAKS skulu nútímansgerast og framtíðartryggjast. TAKS hevur boðað at tað er bráðneyðugt at farið verður í gongd við at nútímansgera og framtíðartryggja KT-skipanirnar hjá TAKS. Hesar eru grundarlagið fyri meginpartin av inntøkunum hjá Landskassanum. KT-skipanin er frá 1984, og síðani tá er bygt uppá hesa skipan, soleiðis at talan er samanlagt um eina sera stóra og fløkjasliga skipan, sum er ment í gamlari tøkni.

Fyri at nútímansgera skipanirnar hjá TAKS, er ætlanin at seta í verk 35 verkætlanir. Hesar 35 verkætlanirnar verða býttar á fýra parallellar menningarleiðir, sum síðani verða raðfestar av leiðsluni á TAKS út frá eini meting av, hvat gevur TAKS og føroyska samfelagnum mest virði.

Út frá hesi yvirskipaðu ætlanini, verða verkætlanirnar á hvørjari leið raðfestar í eini agilari tilgongd. Raðfestingarnar verða gjørdar út frá, hvørjar verkætlanir eru mest átrokandi í mun til avgerandi vitan, sum ikki verður tøk innan stutta tíð, og sum harvið skapa størst virði.

- Útskifting av tøkniliga pallinum til nýmótans tøkni.
- Nútímansgerð av teimum 35 størri og smærri fakskipanunum, har nágreinast skulu gott 60 eftirlitslistar og 900 skermmyndir fyri at tryggja, at allir funktiónir eru við.
- Nýggj standardloysn til at handfara hendingarlistar til at stuðla undir skynsamt eftirlit.
- Nýggjar standardloysnir, sum knýta Kjarnuna og journalskipanina saman til at stuðla undir smidliga málsviðgerð.
- Nýggjar standardloysnir til at stuðla undir eftirlitsarbeiðið.
- Nýggj brúkarastýring grundað á Active Directory.
- Nýggj standardloysn til skjalagoymslu.
- Nýggj standardloysn til kladdu.
- Integratión til virkisskránna, FOLK, BSL og aðrar samstarvspartnarar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið er gjørt í samstarvi við TAKS. Hesi hava fingið uppskotið til ummælis, umframt at uppskotið liggur frammi á almenna hoyringsportalinum frá 29.01.24 til 12.02.24:

- Vinnuhúsið (KT felagið)

- Felagið Føroyskir Peningastovnar

- Kommunufelagið

- Hagstovan

- Gjaldstovan

# Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

## 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kosnaðarætlanin vísur ein samlaðan kostnað fyri heildarætlanina á umleið 100 mio. kr. í 2022 krónum. Fyri at taka hædd fyri príshækkingum, óvissu og óvæntaðum meirkostnaði, eigur at verða lagt upp fyri einum meirkostnaði á 50% omaná samlaðu kostnaðarætlanina.

Fíggjarkarmurin sær tí soleiðis út árini 2024 til 2029.

| | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 | Samanlagt | Prísbroyting | Váðaískoyti | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Starvsfólk | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 7,2 | 1,4 | 2,2 | 10,8 |
| Menningarleið 1 (Borgari) | 4,7 | 7,6 | 6,2 | 5,0 | 6,5 | 1,5 | 31,4 | 5,6 | 10,1 | 47,1 |
| Menningarleið 2 (Virkir) | 4,4 | 7,4 | 5,8 | 6,0 | 6,0 | 5,0 | 34,6 | 6,7 | 10,6 | 51,9 |
| Menningarleið 3 (Grunnur vm.) | 0,4 | 0,0 | 5,5 | 5,5 | 0,0 | 0,0 | 11,4 | 2,2 | 3,5 | 17,1 |
| Menningarleið 4 (Bókhald) | 0,0 | 5,5 | 4,0 | 5,5 | 0,0 | 0,0 | 15,0 | 2,6 | 4,9 | 22,5 |
| **Samanlagt** | **10,7** | **21,7** | **22,7** | **23,2** | **13,7** | **7,7** | **99,6** | **18,5** | **31,3** | **149,4** |
| Mettur prísvøkstur | | 2,7 | 3,8 | 5,0 | 3,6 | 2,4 | 17,6 | | | |
| Váðaískoyti | | 8,1 | 8,5 | 7,6 | 5,2 | 2,7 | 32,1 | | | |
| Samanlagt við prís og váðaískoyti | **10,7** | **32,6** | **35,0** | **35,7** | **22,6** | **12,9** | **149,4** | | | |

Í Fíggjarlógini fyri 2024 eru játtaðar 11 mió.kr.. Hædd verður tikið fyri írestandi verkætlanini í langtíðarløguætlan landsins 2025 til 2029.

## 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Verkætlanin leggur dent á at skapa nýmótans KT-amboð, sum kunnu vera við til at skapa eitt skynsamari og effektivari TAKS. Verkætlanin hevur onga umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

## 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.
Hví stendur Ja undir umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna?

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

## 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

## 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

## 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið er ikki í ósamsvari við hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan og sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Viðvíkjandi evropeiska mannarættindasáttmálanum kann upplýsast, at nýggja kt-skipanin fer at lætta um privat- og

familjulívið, við tað at løntakarar fáa eina betri tænastu við lagaligari mannagongdum og eini smidligari kt-skipan, sum ger tað lættari at gera broytingar undir barsilstíðini.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella kommunur?**
Uppskotið heimilar landsstýriskvinnuni at nýta upp í 150 mió. kr. til fremja heildarætlan fyri nútímansgerð av skatta- og tollskipanum landsins.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Umframt omanfyri nevndu avleiðingar fer lógaruppskotið at gera tað lættari og smidligari at gera tillagingar í kt-skipanini, tá ið broytingar í framtíðini verða gjørdar í galdandi lóggávu.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

Eftir uppskotinum verður heimilað landsstýriskvinnuni at gera neyðugar avtalur at nútímansgerða skipanirnar hjá Taks.

Hetta er ein materiell heimild, og av tí at ætlanin hevur við sær útreiðslur 6 fylgjandi fíggjarár, er neyðugt at útvega játtan fyri hvørt árið sær til útreiðslurnar í tí árinum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2031.

Fíggjarmálaráðið, 25.01.2024.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Fylgiskjal 1 "Heildarætlan fyri Kjarnuna Nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 – 2029
Fylgiskjal 2 "Útboð av Outsystems 2021"